# Kunngerðablaðið A

2022 Givið út 7. mai 2022

Nr. 80 6. mai 2022


**Løgtingslóg**
**um**
**barnaváttanir**
**(Barnaváttanarlógin)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

*Virkisøki*

**§ 1.** Løgtingslógin er galdandi fyri landsstovnar, kommunalar stovnar og privatar løgfrøðiligar persónar.

*Allýsingar*

**§ 2.** Ein barnaváttan sambært hesi løgtingslóg er ein váttan við teimum upplýsingum, ið eru nevndar í § 36 í bekendtgørelse for Færøerne om behandling af personoplysninger i Det Centrale Kriminalregister (Kriminalregisteret).

**§ 3.** Ein arbeiðsgevari sambært hesi løgtingslóg er einhvør landsstovnur, kommunalur stovnur ella privatur løgfrøðiligur persónur, ið setur persón, sum er 15 ár ella eldri, í starv ella setur persón, sum er 15 ár ella eldri, til ávísa uppgávu, sama um hetta er lønt ella ólønt, ella um starvið ella uppgávan er varandi ella tíðaravmarkað.

*Skyldan at útvega barnaváttan*

**§ 4.** Um eitt starv ella ein uppgáva ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, ella um tann, ið settur verður, sum liður í starvinum ella uppgávuni, fær møguleika at koma í beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, hevur arbeiðsgevari skyldu til at útvega sær eina barnaváttan sambært § 2, áðrenn viðkomandi verður settur í starv ella verður settur til uppgávuna, sbr. tó stk. 4.

*Stk. 2.* Skyldan sambært stk. 1 fevnir harumframt um hjúnafelagar, sambúgvar, heimabúgvandi børn yvir 15 ár o.o., sum umvegis sítt fasta tilknýti til tann, ið setast skal í starv, fáa møguleika at koma í beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár.

*Stk. 3.* Um arbeiðsgevari lýsir alment eftir umsøkjarum til starv sambært stk. 1, skal greitt tilskilast í starvslýsingini, at arbeiðsgevarin hevur skyldu til at útvega barnaváttan sambært § 2, áðrenn setanin verður framd.

*Stk. 4.* Er tað av praktiskum orsøkum ikki gjørligt at útvega barnaváttan, áðrenn viðkomandi verður settur til ávísa uppgávu, ið ber í sær beinleiðis og regluligt samband við børn undir 15 ár, skal barnaváttanin verða fingin til vegar skjótast gjørligt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi er settur til uppgávuna.

*Stk. 5.* Ásetingin í stk. 4 er ikki galdandi fyri starvssetanir.

**§ 5.** Hóast ásetingina í § 4 skal barnaváttan ikki fáast til vegar, tá viðkomandi verður settur í nýtt starv, ella verður settur til nýggja uppgávu, hjá sama arbeiðsgevara. Tað sama er galdandi, tá viðkomandi verður endursettur, tá brotið í setanartíðini er orsakað av natúrligum broti, so sum summarferiu, nýggjum tíðarskeiði, bygnaðarligari umskipan ella endurnýggjan av tíðaravmarkaðum starvi, har samanhangur í tíð er millum gomlu og nýggju setanina.

**§ 6.** Barnaváttan kann bert verða fingin til vegar við skrivligum samtykki frá tí, ið barnaváttanin viðvíkur.

*Stk. 2.* Tey, ið hava atgongd til barnaváttanir, ið eru fingnar til vegar sambært hesi løgtingslóg, eru fevnd av reglunum um tagnarskyldu í revsilógini.

**§ 7.** Sýtir persónur fyri at geva samtykki til, at barnaváttan verður fingin til vegar, áðrenn viðkomandi verður settur í starv, ella verður settur til ávísa uppgávu, kann arbeiðsgevarin ikki seta viðkomandi í starv ella til ávísa uppgávu.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at barnaváttan og samtykki í tí sambandi skulu fáast til vegar umvegis talgilda skipan.

**§ 9.** Vísir barnaváttanin, at viðkomandi persónur er dømdur fyri kynsligt brotsverk ella kynsligan harðskap, kann arbeiðsgevarin tó ikki seta viðkomandi í starv ella til ávísa uppgávu. Tó kunnu frávik gerast, tá talan er um brot á § 222, stk. 1 í revsilógini og talan er um linnandi umstøður.

*Revsiásetingar*

**§ 10.** Tilætlað brot á § 4, stk. 1 og 2, § 7 og § 9, stk. 1, 1. pkt. verður revsað við sekt.

*Stk. 2.* Fyri brot á hesa grein koma feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Stk. 3.* Stk. 1 er ikki galdandi fyri almennar fyrisitingarmyndugleikar.

*Stk. 4.* Lógarbrot sambært hesi løgtingslóg verða lógsøkt við almennari átalu.

*Eftirmeting*

**§ 11**. Landsstýrismaðurin setir í løgtingsárinum 2027 fram løgtingslógaruppskot um endurskoðan av løgtingslógini.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 12.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2022 og er galdandi fyri nýggjar starvssetanir, ið verða framdar eftir, at løgtingslógin er komin í gildi, tó undantikið setanir hjá sama arbeiðsgevara fevndar av § 5.

*Stk. 2.* Um arbeiðsgevari setur persón til ávísa uppgávu, sum viðkomandi hevur sett til uppgávu áðrenn gildiskomu løgtingslógarinnar, skal arbeiðsgevari útvega barnaváttan eftir § 4, hóast viðkomandi persónur áður er settur til ávísa uppgávu hjá sama arbeiðsgevara. Eftir hetta er § 5 galdandi.

Í Tinganesi, 6. mai 2022

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 63/2021